

Heimurin broytist hvønn einasta dag. Tí mást tú gera teg til reiðar at fylgja við.
Handilsskúlin hevur alla ta nýggjastu kunningartøknina og brynjar teg til framtíðina. Uttan mun til um tú eftir Handilsskúlan velur eina hægri útbúgving sum t.d. løgfrøði ella búskaparfrøði ella fert beinleiðis út í vinnulívið. Uttan mun til um tú velur FHS ella Hægri Handilsskúla. Handilsskúlin gevur tær **bæði** møguleika fyri fram-haldslestri **og** vinnuførleika.

Ring til okkara ella støkk inn á gólvið, um tú vilt vita meira um Handilsskúlan.
Seinasta freist at tekna seg til Handilsskúlan er 15. mars.

**Hví taka annað, tá tú kanst fáa bæði?**

FØROYA HANDILSSKÚLI

Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177, 110 Tórshavn, Tel 31 71 77
Kambsdalur, 530 Fuglafjørður, Tel 44 49 00

Søkt verður eftir
**TEKNISKUM LEIÐARA**
til Skipasmiðjuna á Skála

**Starvið:**
Sum tekniskur leiðari fær tú ábyrgdina av øllum tekniskum spurningum á Skipasmiðjuni. Tekniski leiðarin verður partur av leiðslu felagsins við beinleiðis tilvísing til stjóran. Tekniski leiðarin skal vera við til at menna virkið tekniskt, somuleiðis sum hann skal viðvirka til at styrkja verandi virksemi og finna nýggjar møguleikar fyri øktum virksemi. Arbeiðsplássið er á Skála.

**Høvuðsuppgávur:**
- at vera tekniskt tengjulið millum virkið, viðskiftafólk og myndugleikar
- at vera við til at leggja ætlanir fyri arbeiði og menning av virkinum
- at vera við til at mynda leiðsluna á virkinum bæði dagliga og við framtíðini í huga
- at vera formonnum og starvsfólki annars til hjálpar í tekniskum spurningum
- at leiða tilboðsrokning og gera metingar av arbeiðum sum heild, bæði fíggjarliga og hvat viðvíkur tíð

**Førleikar:**
Vit rokna við at tú:
- er maskinverkfrøðingur og/ella hevur víðkað maskinmeistaraprógv
- hevur góð samskiftis- og samstarvsevnir
- hevur evnir at greina tekniskar trupulleikar, viðgera møguleikar til loysnir og ert før/ur fyri at taka avgerðir
- dugir væl at málbera teg á føroyskum, skandinaviskum og enskum máli, bæði skrivliga og munnliga

**Vit bjóða:**
Eitt sjálvstøðugt arbeiði við góðum møguleikum fyri persónligari menning. Løn, trygging og eftirløn eftir nærri avtalu partanna millum.

Um hetta hevur tín áhuga ella um tú hevur spurningar hesum viðvíkjandi, vinarliga set teg í samband við okkum á tlf. 441155.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

**Skipasmiðjuna á Skála**
att.: Jón Danielsen
FO-480 Skála

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og freistin at lata inn er 10. mars 2000.

SKIPASMIÐJAN
Á SKÁLA
**www.faroeyard.fo**
**skala@faroeyard.fo**

P/f Skipasmiðjan á Skála er dóttirfelag hjá P/f Tórshavnar Skipasmiðju. 75 fólk starvast á Skipasmiðjuni, sum í løtuni hevur sáttmála við Føroya Landsstýri um nýggja Sandoyarferju, ið skal latast um ársskiftið.

## VALUTAKURSIR

| | | 03.03.00 | Ultimo februar |
|---|---|---|---|
| *USA* | **Dollarar** | 772,9100 | 764,6400 |
| *Bretland* | **Pund** | 1218,8700 | 1219,3200 |
| *Týskland* | **Markur** | 380,8400 | 380,7900 |
| *Svøríki* | **Króna** | 87,8900 | 88,2700 |
| *Noreg* | **Króna** | 92,1800 | 92,1300 |
| *Frakland* | **Frankur** | 113,5500 | 113,5400 |
| *Belgia* | **Frankur** | 18,4640 | 18,4620 |
| *Sveits* | **Frankur** | 463,5300 | 463,5600 |
| *Holland* | **Gyllin** | 338,0000 | 337,9600 |
| *Italia* | **Liri** | 0,3847 | 0,3846 |
| *Finnland* | **Markur** | 125,2700 | 125,2600 |
| *Ísland* | **Króna** | 10,5100 | 10,4800 |
| *Eysturríki* | **Skillingur** | 54,1300 | 54,1240 |
| *Spania* | **Pesetas** | 4,4770 | 4,4760 |
| *Portugal* | **Escudos** | 3,7150 | 3,7150 |
| *Kanada* | **Dollari** | 531,5000 | 526,3300 |
| *Grikkaland* | **Drakmur** | 2,2320 | 2,2300 |
| *Japan* | **Yen** | 7,1869 | 6,9532 |
| *Írland* | **Pund** | 945,7600 | 945,6500 |
| | **Evra** | 744,8500 | 744,7600 |

FØROYA SPARIKASSI

**Hjá okkum fáast vognar og útgerð til allar flutningsuppgávur!**

- Viðfestisvognar sum lasta frá 325 kg. upp til 2.600 kg. –nógv model!'
- Eykalutir til viðfestisvognar
- Sekkjavognar, hydr. lyftiborð –arbeiðsbord
- Vognar til gassfløskur, oljutunnur, kassar, trappir –óteljandi møguleikar!
- Gafflar til heisan av plattum, vøru o.a.
- Tip - Ruskkonteinarir til trukkar
- Spennireimar og lyftistroppar
- Sleipikrókar til øll bilmerki!

Tosið við okkum!
**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

Lýsið í sosialinum



# Ein ullint søga

*- Onkur vil vera við, at hetta er ein ullint søga, men so er ikki, segði Árni Brattaberg m.a., tá hann hósdagin beyð vælkomin í nýggju handilshølunum hja Suðuroyar Ullvirki í Vágsbotni í Havn*

Hóast søgan ikki er ulint, so er hon um ull, og eisini um eitt virki, ið av mongum varð mett at hava ringar framtíðar vánir, tá tað byrjaði í 1997, men sum hóast hetta hevur ment seg.

Hósadagin var lítil sam-



*Árni Brattaberg*



*Suðuroyar Ullvirki hevur latið upp sølubúð í Havn*

koma í samband við, at Suðuroyar Ullvirki hevur latið upp sølubúð í Havn. Fyri 14 døgum síðani fekk virkið eisini søludeild í hugnaligu handilshúsunum á Gørúnum í Vági.

Í gjár klokkan 10 lat sølubúðin í Vágsbotni í Havn upp.

**Lidnar vørur**

Á samkomu hósdagin segði Árni Brattaberg, stjóri, m.a. í vælkomurøðu síni, at tá hann og konan Karin so smátt byrjaðu í 1997, var ikki ætlanin at fara undir at framleiða lidnar vørur.

Tey fingu innivist í fiskakjallaranum á Gørðunum í Vági, ið júst hevði røttu støðd, so maskinur o.a. slapp innar.

Men brátt gjørdist greitt, at tað at framleiða tógv var ikki nóg mikið. Lidnar vørur máttu til. Og fyri júst einum ári síðani varð fyrsta troyggjan framleidd. Í februar 1999 var tað, at ein troyggja, sum Karin sniðgav, sá dagsins ljós.

Suðuroyar Ullvirki samstarvar í dag við fleiri av okkara ungu og vónaríku sniðgevum m.a.tær, ið gera merkið Pau og við Guðrun Ludvig. Í dag verða mangar av troyggjunum seymaðar á seymistovu í Sandvík. Eisini knapparnir í pløggunum frá ullvikinum verða framleiddir í Suðuroynni, nevniliga hjá Torgerð Suðuroy í Vági.

Árni nevndi ullina, sum einki annars verður gjørt við í Føroyum. Mong mettu eisini, at slíkt virki fór ongantíð at ganga, tí tey ungu fóru ikki í ullint pløgg. Alt hetta sær út til at vera mótprógvað.

**Selja í Havn**

Orsøkin til, at Ullvirkið sjálvt letur upp sølubúð í høvuðsstaðnum er, at ynskiligt er at fáa vørurnar sjónligar uttanfyri Suðuroynna, men tó hevur verið trupult at fáa handlar í høvusstaðnum at leggja ullvørurnar á sínar hillar. Árni Brattaberg legði dent á, at vøran hjá Ullvirkinum er rein náttúruvøra og skal eisini marknaðarførast sum slík. Tó var hann greiður yvir, at slíkt marknaðarføringstól er ikki til taks, men er vøran góð,so er vón.

Hann fegnaðist um undirtøkuna, ið vørurnar hava fingið.

Í gjár klokkan 10 lat Suðuroyar Ullvirki dyrnar upp niðri í Vágsbotni. Handilin er á 2. hædd, har Jóan Jakku, ella Lei, vóru fyrr.

# – Tað verður spennandi at hoyra

*– Tað verður sera spennandi at hoyra verkið framført og eg gleði meg, sigur Sunnleif Rasmussen*

SVEINUR TRÓNDARSON

Um ein mánað fær Sunnleif Rasmussen sín elddóp, sum symofonitónasmiður. Tað er ikki heilt rætt, men vit siga tað er so, tí fríggjakvøldið 31. marts verður symfoniin »Oceanic Days« frumframførd í Norðurlandahúsinum.

**Tvey og eitt hávlt ár**

Sum vera mann er Sunnleif sera spentur upp á at hoyra úrslitið av arbeiði sínum, spælt av einum orkestri, sum telur 85 mans.

Sunnleif Rasmussen fekk áheitanina frá Norðurlandahúsinum at gera symfoniina í 1994 og hann fór til verka beinanvegin so at siga.

Eitt stórverk, sum ein symfoni, er ikki nakað, sum verður gjørt eftir lítlari løtu, og í veruleikanum tók arbeiði tvey og eitt hálvt ár.

– Eg byrjaði í 1994 og arbeiddi til einaferð í 1197 tá hon var liðug. Eg gjørdi nú ikki bara tað, tí eg gjørdi okkurt annað inn í millum, men tvey og eitt hálvt ár tilsamans mundi eg brúka, sigur Sunnleif.

At gera eina symfoni var kortini ikki fremmandur tanki fyri Sunnleif, tí hann hevði gingið við tankanum í høvdinum í eina tíð. Grundhugskotini vóru til staðar tá áheitanin kom, og tí var tað kanska ikki so langt frá hugskoti til tað, sum so einaferð gjørdist úrslitið.

**Ikki øll á pallinum**

Tað, sum sermerkir symfoniina hjá Sunnleifi er, at ikki allir tónleikararnir eru á pallinum og so valið av ljóðførum.

– Petur gav mær fríar hendur tá tað um ljóðførini ráddi og tað sæst aftur. Harafturat havi eg latið tveir tónleikarar standa aftast í konserthøllini og tá frumframførslan verður fara tveir sum spæla upp á slagverk, at standa aftast við klingruna, greiðir Sunnleif frá.

– Eitt annað, sum kanska ikki er so vanligt er at eg havi tvei synthesisarar við. Mær dámar væl at arbeiða við slíkum ljóðførum og tí havi eg teir við, leggur Sunnleif afturat.

**Møguliga í Japan**



*Fróði Vestergaard, verkætlanarleiðari og Helga Hjørvar, stjóri í Norðurlandahúsinum rokna við, at tað verður útselt til frumframførsluna fríggjakvøldið 31. marts, og halda tí møguleikan opnan fyri eini eykaframførslu leygardagin 1. apríl*

**Mynd: Álvur Haraldsen**

*Sum sagt aðrastaðni ætlaði Norðurlandahúsið, at verkið skuldi frumframførast í Føroyum og tann ætlanin gongur nú út, men veit Sunnleif um nakra aðra framførslu av verkinum?*

– Tað er einki greitt beint sum er, men eg havi hoyrt okkurt um, at tað skal framførast í Danmark eisini. Harumframt arbeiðir forlagið hjá mær við at fáa verkið við til eitt tiltak, sum verður í Japan næsta ár, sum hevur havið, sum útgangsstøði. Annað veit eg ikki um í løtuni, sigur Sunnleif.

Hóast konsertin verður í Norðurlandahúsinum, so verður kortini møguleiki hjá enn fleiri at síggja hana, tí Útvarp Føroya fer at senda frá konsertini. Um tað verður beinleiðis er ikki vist, men tað verður sent.

Somuleiðis er við Danmarks Radio. Á tíðindafundinum í gjár segði stjórin, Helga Hjørvar, at danska radiostøðin hevði boðað frá, at teir ætla sær at senda konsertina, men hon visti ikki at siga, um hon fór at verða send beinleiðis.

Til seinast kunnu vit siga, at symfoniin »Oceanic Days« varir í trý korter, so her er í orðsins rætta týdningi talan um eitt ræ ttuligt stórverk.